# Veteranar fylgjast í singer/ songwriter finaluna

**Ung talent og kingo sálmur í nýggjum hami kundu ikki forða Eystein Johannesen at vinna seg í singer/songwriter 2005 finaluna í Hafnia Lounge leygarkvøldið**

SANGKAPPING



*Eystein Johannesen gjørdi ikki nógv burtur úr sær sjálvum leygarkvøldið. Hann læt heldur tónleikin tala*

Tað er munur á tónleikarum og munur á undanumførum. Leygarkvøldið kundi ein fullsett Hafnia Lounge aftur sanna, at tað eru nógv talent innan singer/songwriterstílin at finna í Føroyum. Men tað var kortini stórur munur á hesum umfarinum og tí fyrra, sum varð hildið seinasta leygarkvøld. Áhoyrararnir fingu rættiliga staðfest, at hóast singer/songwriterstílurin kann tykjast einstáttaðar, so finst eisini stórt fjølbroytni innan hesa tónleikagrein.

### Frískir ungir

Luttakararnir leygarkvøldið kunnu av røttum flokkast í tveir aldursbólkar. Í tí yngra endanum vóru 19 ára gamli Fróði Hansen og 21 ára gamli Pól Esbern Hanusarson. Teir báðir hava at kalla ikki verið at hoyrt alment í Føroyum, men báðir tveir bitu rættiliga frá sær leygarkvøldið.

Fróði var tann fyrsti á pallinum. Við sær hevði hann nakrar trúgvar stuðlar, sum heppaðu óført. Hann spældi tvey egin løg við egnum teksti. Men hann tók rættuliga fólk á bóli við einum nýggju lagi til eitt kent lag hjá Terja og Føstufressum. Fróði smæddist á ongan hátt burtur á pallinum. Tað sást týðuliga, at hann er glaður fyri at spæla tónleik, og hann dugdi væl at fáa fólkið við.

Tað sama kann sigast um Pól Esbern Hansen. Hann vildi ikki lata møguleika gleppa sær av hondum og meldaði seg til, og tað sømdi seg eisini. Eitt sereyðkenni við hansara tónleiki er, at hann leggur sera stóran dent á gittarspælið, og tað tóktist eisini sum um, at fólk tóku væl ímóti hansara tónleiki. Eingin ivi er um, at vit fara at hoyra meira til hesa báðar ungu tónleikaspíranir.

### Ravnur og Kingo

Eystein Johannesen gjørdi ikki nógv burturúr sær sjálvum leygarkvøldið. Hann lat heldur tónleikin tala. Fjøruti ára gamli heimasandsmaðurin hevur drúgvar royndir sum bassspælari í bólkinum »Ravnar«. Men tað er ikki á hvørjum degi, at hann spælir alment fyri tíðina, hóast tónleikurin fyllir ein stóran part av hansara lívi. Sangirnir hjá honum vóru klassiksar kærleiks balladur. Til fyrsta sangin spældi hann griskan gittar við átta streingjum; til hinar sangirnar nýtti hann klaver sum ljóðføri. Tað svitast ikki, at hansara tónleikur hevur ein serligan dám, sum kanska ikki øll fella fyri beinanvegin.

Um nakar kundi sigast at vera favorittur leygarkvøldið, so mátti tað vera Niels Midjord. Flest allir føroyingar kenna Niels Midjord og hansara eyðkenda tónleik og sangir. Hann hevði meldað seg til fyri at stuðla tiltakinum. I skjáttuni hevði hann tvey nýggj føroysk løg, og hann hevði gjørt eitt lag til ein gamlan Kingo sálm. Kingo er eitt eindømi til tílíkar singer/songwriter kappingar, og Niels Midjord fekk enn einaferð staðfest sína serstøðu í føroyskum tónleiki. Niels hvíldi rættiliga í sær sjálvum, og hann er á ongan hátt farin av móta, sum tað eisini hoyrdist leygarkvøldið.

### Veteranur víðari

Dómararnir brúktu langa tíð um at finna vinnaran hetta leygarkvøldið. Í síðstu viku vann Brandur Jacobsen seg víðari í finaluna. Hann hevur at kallla goymt seg burtur av føroyska tónleikapallinum, síðani hann gjørdist ársins songrødd í 1991.

Á sama hátt hevur lítið verið at hoyrt til Eystein Johannesen seinnu árini. Í áttatiárunum spældi hann nógv kring oyggjarnar við bólkinum »Ravnar«. Men tónleikadygdirnar hevur hann eftir øllum at døma ikki gloymt. Í øllum førum avgjørdu dómararnir til síðst at senda hann víðari til singer/songwriter 2005 finaluni, sum verður 5. november.

### Síðsta innleiðandi

Komandi leygarkvøld 29. oktober kl. 22:00 verður 3. og síðsta innleiðandi umfari í ársins útgávu av singer/songwriter 2005. Luttakararnir verða aftur fýra í tali og tey eru: Símun Klein, Helgi Midjord, Petur Háberg og Evi Isaksen.



*Fróði Hansen*



*Pól Esbern Hanusarson*



*Niels Midjord*

# Dansiframførsla í Meiarínum

**Fríggjakvøldið og leygarkvøldið komandi verður høvi at síggja og uppliva dansiverkið »Too Short«, ið vann kappingina Dansolution á Dansescenen í Keypmannahavn fyrr í ár**



DANSUR

Komandi vikuskiftið er modernaður dansur á skránni í Gamla Meiarínum í Havn. Millum verkini, ið framførd verða, er »Too Short«, sum Rannvá Káradóttir, Kristina Sørensen Ougaard og Seke Chimutengwende vunnu dansikappingina Dansolution 2005 við í september í ár.

Harumframt verða tvey onnur nýggj verk framførd, og tveir dansi-stuttfilmar vístir. Rannvá og Kristina, ið hava koreograferað hvør sítt verk, hava hesaferð arbeitt saman við ávikavist Marionnu Mørkøre (video) og Dánjal á Neystabø (tónleik).

Dansiframførslurnar verða í Gamla Meiarínum fríggjakvøldið og leygarkvøldið tann 28. og 29. oktober kl. 20, kostnaður 80 kr.

## Bilasølustevna á Giljanesi

BILFRAMSÝNING

Komandi vikuskifti skipa FS-Vágar fyri bilasølustevnu í ítróttarhøllini á Giljanesi. Fimm bilasølur og Tryggingarfelagið Føroyar fara at sýna fram. Bilasølurnar eru Berg Motors, Reyni Service, VR-Bilar, Norðbil og Norðcar, og koma bilar frá um 20 framleiðarum at verða sýnd fram.

Framsýningin byrjar báðar dagarnar kl 14 og endar kl 19. Umframt at tey vitjandi fáa høvi at tosa um bilakeyp, trygging og fígging við framsýnararnar, verður skipað fyri ymiskum undirhaldi.

Leygardagin undirhalda Popcorn og Sámal Ravnsfjall á pallinum, og sunnudagin verða tað fyrst Kim Hansen og síðani Petur Pálsson og Knút Háberg Eysturstein. Harumframt verða mótasýningar, matsøla, matog køkutombola. Væl umtókta ókeypis spæliplássið til børnini verður aftur í ár í fimleikarhøllini.

Í samband við framsýningina veða lutaseðlar seldar, har vinningurin verður ein telda frá Formula.fo. Á lutaseðlunum stendur eitt »password«, sum kann roynast á telduni frá kl. 17.00 sunnukvøldið, siga tey í FS-Vágum.

## Hugnaløta við fyrilestrum

HUGNALØTA

Allan oktober mánað hevur Føroya Felag móti Krabbameini, eins og nógv onnur krabbameinsfeløg í londunum rundan um okkum, varpað ljós á bróstkrabba - hesa sjúkuna, sum rakar eina út av níggju kvinnum ella umleið 25 kvinnur í Føroyum um árið.

Bót til bata, sum er sjálvhjálparbólkur undir krabbameinsfelagnum við kvinnum, sum hava ella havt havt krabbamein í brósti, endar bróstmánaðin við almennum fyrilestrum á Hotel Hafnia.

Eliesar Olsen, yvirlækni á Landssjúkrahúsinum, heldur fyrilestur um skurðviðgerð av bróstkrabba. Eisini fer hann at røða um nýggjastu viðgerðarhættirnar og um møguleikar fyri at varðveita bróstini umframt endurnýggjan ella endurgerð av skurðviðgjørdum brósti.

Inga Poulsen Dam, prestur, heldur fyrilestur um lívsdygd í sambandi við lívshóttandi sjúku.

Paula Jespersen úr sangbólkinum Salt fer at syngja, og Arnvør á Torkildsheyggji spælir undir. Hugnaløtan verður á Hotel Hafnia leygardagin 29. oktober klokkan 15.00. Øll eru hjartaliga vælkomin, Bót til Bata í tíðindaskrivi.

## Lena í Klingruni



**Leygarkvøldið 29. oktober hevur LENA akkustiska konsert í Klingruni í Norðurlandahúsinum. Serligur gestur er Flóvin Viderø úr bólkinum Dejavu, ið byrjar konsertina**

KONSERT

Leygarkvøldið klokkan 20 verður høvið at hoyra Lenu í Klingruni.

Seinast Lena hevði konsert í Norðurlandahúsinum var í sambandi við føroysku útgávuna av Can't Erase It í mars mánað 2004, og tá var stórur bólkur við henni á pallinum.

Hesaferð verður talan eina »un-plugged« konsert, har Lena og Niclas framføra løgini akkustisk, og har tey fáa hjálp á nøkrum løgum frá Jóhannus á Rógvu Joensen á bassi.

Umframt Lenu fer sangarin og sangskrivarin Flóvin Viderø eisini at spæla nakrar sangir. Flóvin er eisini kendur úr rockbólkinum Dejavu, men hetta kvøldið fer hann at framføra nøkur egin løg sjálvur.